LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

**Reglugerð**
**fyri**
**veiting av stuðulsjáttan til útoyggjamenning**

Við atliti at stuðulsjáttan 14.37.2.19 Stuðul til útoyggjamenning, verða hesar leiðreglur ásettar:

**1. Endamál**
1.1. Endamálið er at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri hesar. Útoyggjar, sum koma undir hesa skipan, eru: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

**2. Stuðulstreytir**
2.1. Stuðul kann veitast einstaklingum, virkjum, feløgum og kommunum.
2.2. Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.

**3. Stuðul til serligt endamál**
3.1. Er stuðul settur av til serligt endamál í viðmerkingunum á fíggjarlógini, skal henda upphædd nýtast til ásetta endamál.

3.2. Er stuðul settur av uttan nærri endamál, kann Løgmálaráðið gera av, um stuðulin skal nýtast til serligt endamál, um mett verður, at tað er átrokandi at stuðla innan ávíst øki.

**4. Umsókn**
4.1. Lýst verður eftir umsóknum í bløðunum og á heimasíðuni hjá Løgmálaráðnum. Freistin at søkja er 1. mars í stuðulsárinum, uttan so at tað er lýst við aðrari freist á heimasíðu ráðsins.

4.2. Umsóknir skulu skrivast á oyðublað nevnt *Umsóknarblað til stuðul av játtanini til útoyggjamenning*, sum er tøkt á heimasíðu Løgmálaráðsins. Oyðublaðið fæst eisini við at venda sær til ráðið.

4.3. Umsókn skal vera grundað á fíggjarætlan fyri árini, ið verkætlanin fevnir um. Eisini skulu átøk og virksemið fyri stuðulsárini verða lýst.

**5. Játtan**
5.1. Játtanin verður latin, um stuðul er til taks á fíggjarlógini, konto 14.37.2.19.

5.2. Játtan av umsóknini verður latin við grundarlagi í umsóknini, í seinasta lagi tveir mánaðir eftir at freistin at søkja er farin.

5.3. Løgmálaráðið tilskilar sær rætt til, um tað verður mett neyðugt, at senda umsóknina til ummælis hjá fakliga serkønum.

Gongin 7 • Postrúm 64 • FO-110 Tórshavn
Telf. +298 35 80 80 • T-postur: lmr@lmr.fo

5.4. Løgmálaráðið kann krevja upplýsingar um innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur í verkætlanarskeiðinum.

5.5. Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, ella um játtaður stuðul fellur aftur, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

**6. Útgjald av stuðli**

6.1. Stuðulin verður latin sambært treytunum í hesi reglugerð og játtanarlóg landsins. Stuðulin verður útgoldin, tá ið umsøkjarin hevur góðtikið treytirnar í stuðulsjáttanarfráboðanini.

6.2. Er ikki av álvara farið undir arbeiðið, sum hevur fingið játtað stuðul, áðrenn eitt hálvt ár eftir, at stuðulin er játtaður, fellur tilsøgnin burtur, um ikki annað er avtalað við Løgmálaráðið, og stuðulin skal gjaldast aftur.

6.3. Útgoldin stuðul verður kravdur afturgoldin, um avlop er í mun til avtalaða virksemið.

**7. Fíggjarætlan, roknskapur og grannskoðan**

7.1. Fíggjarætlan, sum verður løgd saman við umsókn, skal lýsa væntaðar inntøkur og útreiðslur.

7.2. Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar sambært §§ 21 ella 22 í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

7.3. Grannskoðaður ársroknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Løgmálaráðnum í seinasta lagi 1. apríl árið eftir.

7.4. Hóast nr. 7.3 kann fyri stuðul, sum einans verður veittur eina ferð, og sum er minni enn 100.000 kr. í staðin fyri roknskap, latast Løgmálaráðnum frágreiðing við neyðugum próvtilfari í seinasta lagi 1. apríl árið eftir.

**8. Gildiskoma**

8.1. Hesar reglur koma í gildi 17. januar 2024. Samstundis fer reglugerð fyri útoyggjamenning dagfest 12. apríl 2023 úr gildi.

Løgmálaráðið, 17. januar 2024

**Bjarni Kárason Petersen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein (sign.)